# LÆRARAVEGLEIÐING

## Góði lærari

Børn, sum syrgja, føla seg ofta øðrvísi enn javnaldrarnir, og nógv uppliva, at floksfelagarnir skilja ikki teirra støðu. Men hvussu kunnu floksfelagarnir vita, hvussu tað er at missa ein kæran, um tey ongantíð læra um tað? Endamálið við*Lær um sorg* er, at børn og ung nema sær vitan um, hvat sorg er, eins og tey læra, hvussu tey eru góðir vinir hjá einum floksfelaga, sum syrgir.

Henda vegleiðingin er um, hvussu tú fyrireikar teg til dupultímarnar og hvørjar avritssíður, tit skulu brúka. Harumframt eru vegleiðingar til hvørt einstakt virkni og uppskot til útsagnir og spurningar. Les altíð*Áðrenn tú byrjar*, áðrenn tú fert undir gongdina og les vegleiðingina til ávísu tímarnar frammanundan.

Sorgin hjá børnum er ábyrgdin hjá okkum vaksnu, og ein partur av ábyrgdini er at skipa bestu fortreytir, soleiðis at børn, sum syrgja, kunnu trívast í teirra sosialu felagsskapum. Takk, at tú lærir tínar næmingar um sorg.

Góðan arbeiðshug við *Lær um sorg.*

Blíðar heilsanir

Berin og Krabbameinsfelagið

## Innihaldið í lærаravegleiðingini

Áðrenn tú byrjar ........ 2
1.-2.tími: Hvat er sorg? ........ 3
3.-4.tími: Hvussu sær sorg út? ........ 5
5.-6.tími: Hvussu ert tú góður vinur hjá einum floksfelaga, sum syrgir? ........ 7
EYKA VIRKNI ........ 10

# Áðrenn tú byrjar

*Fýra ráð og ein hjálpandi hond at skipa eina væl eydnaða gongd*

**Trygga flokshølið er ein fortreyt**

Skal gongdin eydnast væl, er neyðugt, at flokshølið er eitt trygt stað, har næmingarnir vita, at tað er í lagi at vísa og siga, hvussu teir hava tað. Tað er fyrimunur, at tit frammanundan hava arbeitt við, hvussu tit eru saman í flokkinum, og hvussu tit tosa við og um hvør annan.

**Syrgir ein næmingur í flokkinum?**

Er tað so, at ein næmingur hevur ella hevur verið í støðum við lívshóttandi sjúku ella deyða, er neyðugt, at tú tosar við foreldrini, áðrenn tú byrjar. Eisini um talan er um miss fleiri ár frammanundan. Hóast barnið ikki minnist deyða foreldrið, kann tað syrgja og sakna tann deyða. Næmingurin skal eisini vita, at tit fara at tosa um at missa. Sí eisini lærarasíðuna á snar.fo

**Kunna heimini í flokkinum**

Á lærarasíðuni á snar.fo er eitt bræv til heimið og ein tekstur, sum tú kanst seta inn í vikuætlanina. Heimið fær kunning um gongdina, og verður biðið um at seta seg í samband við teg, um neyðugt er, at tú veitst um sjúku ella deyða í familjuni. Faldibókin til gongdina kann vera gott høvi at tosa heima um tað, sum tit fáast við.

**Halt eyga við reaktiónum – eisini aftaná**

Sorg er eitt evni, sum kann fáa nógvar ymiskar kenslur og minni fram í næmingunum. Tað kunnu vera dagar ella vikur aftaná, at gongdin er liðug. Minst tí til at tosa um evnið og gongdina í tíðini aftaná. Tit kunnu brúka Miu-litbókina, sum er á lærarasíðuni á snar.fo.dk, soleiðis at næmingarnir fáa høvi at tosa um nýggjar hugsanir og fatanir.

**Vit eru her, hevur tú spurningar**

Tú kanst ringja ella skriva til okkum í Beranum ella Krabbameinsfelagnum, um tú hevur spurningar til gongdina ella tú kundi hugsað tær ráðgeving um ein næming, sum syrgir. Tú finnur okkum á berin.fo og krabbamein.fo.

# 1.-2.tími: Hvat er sorg?

Í fyrstu tveimum tímunum arbeiða næmingarnir við kenslum sum heild, áðrenn teir saman við Miu verða leiddir inn í evnini, sorg, sakn og minnir.

Lærumálini til 1.-2. tíma eru:

- sorg er ein kensla, sum vit fáa, tá ið ein doyr, sum vit elska
- saknurin um tann deyða kann koma til sjóndar í nógvum ymsum løtum og støðum
- tað er gott at hugsa um góðu minnini, sum vit hava um tann deyða.

## FYRIREIKING OG TILFAR

- ☐ Kunna teg um 1.-2. tíma á snar.fo og á síðu 3-4 í hesari vegleiðingini.
- ☐ Hygg at fyrsta filminum um Miu.
- ☐ Skriva avritssíðu 1 út: Vís og být um kenslur (Øll skulu hava hvør sína kenslu – 6 kenslur eru á hvørjum arki).
- ☐ Skriva avritssíðu 2 út: Lær um sorg-faldibók (eitt ark pr. næming. NB: skriva út í litum á A3).
- ☐ Tilfar: Saksar og tekniamboð.

## VEGLEIÐING OG HUGSKOT TIL HVØRT VIRKNI

### 1. RØRSLA: VÍS OG BÝT UM KENSLUR

**Stutt um virknið**

Næmingarnir arbeiða við at skilja ímillum ymsar kenslur. Endamálið er at leiða næmingarnar inn á kenslur sum heild, áðrenn tey kava niður í nýggju kensluna; sorg.

**Soleiðis gert tú**

1. Sig við næmingarnar, at teir fara at fáa eitt myndakort í part, sum teir skulu hyggja at, men ikki vísa øðrum.
2. Greið næmingunum frá, hvat teir skulu gera, soleiðis sum er greitt frá á 1.-2. tíma á snar.fo.
3. Steðga virkseminum aftan á nakrar minuttir, tá ið øll hava havt 2-3 kort í hondini.
4. Flokssprát um virknið.

**Uppskot til spurningar til samanumtøku**

- Hvussu var at vísa kenslurnar við kroppinum?
- Hvussu sóu tey á hinum, hvørjar kenslur tey vístu?
- Hvat er tað, sum ger, at vit hava ymsar kenslur?
- Hvørjar kenslur vóru lættar/torførar at gita?

### 2. FILMUR: MAMMA MIU ER DEYÐ

**Stutt um virknið**

Í filminum hitta tit Miu, hvørs mamma er deyð. Pallurin er settur, soleiðis at tit læra um sorg saman. Filmurin leggur dent á sakn og minnir.

**Soleiðis gert tú**

1. Sig við næmingarnar, at tit skulu læra um eina kenslu, sum eitur sorg. Tú kanst spyrja, um tey kenna orðið frammanundan?
2. Greið frá, at sorg er ein kensla, sum vit fáa, tá ið ein doyr, sum vit elska. Og tá er eyka gott at eiga góðar vinir. Tí skulu tit í felag læra um, hvat sorg er, og hvussu næmingarnir kunnu vera góðir floksfelagar hjá øðrum, sum stríðast við truplar kenslur.

3. Vís filmin um Miu.
4. Tit kunnu hyggja at filminum eina ferð afturat við steðgum, har tit tosa um tað, tit síggja.
5. Flokssprát um filmin. Hvat sóu næmingarnir? Hvat hoyrdu tey. Var okkurt, tey ikki skiltu?

## 3. TEKNING: TEKNIÐ EITT MINNI

**Stutt um virknið**

Næmingarnir falda fyrst bókina, sum teir skulu hava hjá sær alla gongdina. Síðan tekna tey eitt minni í bókina.

**Soleiðis gert tú**

1. Být avritssíðu 2 við faldibókini út.
2. Vís næmingunum, hvussu teir skulu gera, antin eftir teknaðu vegleiðingini ella eftir filmsbrotinum. Leinkið er niðast í vegleiðingini.
3. Bið næmingarnar skriva navn og flokk á síðu 1.
4. Greið næmingunum frá, at teir skulu tekna eitt minni, sum Mia hevur um mammuna. Tey skulu lata faldibókina upp og tekna á síðu 2 inni í bókini.
5. Tak afturíaftur minnini í filminum, sum Mia hevur um mammuna. Næmingarnir kunnu eisini brúka egin minnir, sum Mia hevði kunnað havt um mammuna.
6. Tak saman um minnini, sum næmingarnir hava teknað.

**Uppskot til spurningar til samanumtøku**

- Hvørji minni valdu tit at tekna? Hví júst tey minnini?
- Hvat man Mia tosa við pápan um, tá ið tey minnast mammuna?
- Hví halda tit, at minnir kunnu gera okkum í góðum lag?

## 4. RØRSLA: SAMD ELLA ÓSAMD?

**Stutt um virknið**

Í rørslu taka næmingarnir støðu til tað, sum teir hava arbeitt við.

**Soleiðis gert tú**

1. Sig við næmingarnar, at um eina løtu fara teir at hoyra nakrar setningar. Eru tey samd við setningin, skulu tey seta seg á borðið. Eru tey ósamd við setningin, seta tey seg undir borðið.
2. Les ein setning upp í senn og lat næmingarnar seta seg á/undir borðið. Spyr greinandi setningar so hvørt, og tá ið tú vilt vita, hví næmingarnir hava svarað, sum teir svaraðu.

**Uppskot til orðingar**

- Eg haldi, at tað var stuttligt at vera saman við Miu í dag.
- Eg haldi, at okkurt av tí, sum vit skuldu gera í dag, var eitt sindur torført.
- Eg lærdi um eina nýggja kenslu í dag.
- Eg vil fegin gera meira saman við Miu.
- Mær dámdi væl at falda bókina/tekna/filmin/býta um kort.

# 3.- 4. tími: Hvussu sær sorg út?

Í hesum tímunum arbeiða tit við, at sorg kann koma til sjóndar á ymsan hátt.

Lærumálini til tímarnar eru:

- vit kunnu føla okkum øðrvísi og einsamøll, tá ið vit syrgja
- vit kunnu gott spæla og vera glað, hóast ein, sum vit elska, er deyður
- vit vísa sorg á ymsan hátt, og tað er í fínasta lagi.

## FYRIREIKING OG TILFAR

- ☐ Kunna teg um 3.- 4. tíma á snar.fo og á síðu 5-6 í hesari vegleiðingini.
- ☐ Hygg at øðrum filminum um Miu.
- ☐ Tilfar: tekniamboð og faldibøkurnar frá seinastu tímunum.

## VEGLEIÐING OG HUGSKOT TIL HVØRT VIRKNI

### 1. SAMRØÐA: SEINAST OG Í DAG

| | |
|---|---|
| **Stutt um virknið** | Tak afturíaftur frá seinastu ferð, tit høvdu Lær um sorg við teimum trimum myndunum frá fyrsta filminum um Miu. Myndirnar vísa til tey trý lærumálini frá 1.-2. tíma. |
| **Soleiðis gert tú** | 1. Bið næmingarnar hyggja at myndunum og tosa saman um tær í pørum.<br>2. Tosið um, hvat tit gjørdu seinastu ferð. Hvat serligt minnast tey? Hvat var tað nú, sorg er? Hvat er eitt minni? |
| **Tak afturíaftur lærumálini frá 1.-2. tíma** | • Sorg er ein kensla, sum vit fáa, tá ið ein, sum vit elska, doyr.<br>• Saknurin um tann deyða kann koma til sjóndar í nógvum ymsum løtum og støðum.<br>• Tað er gott at hugsa um góðu minnini, sum vit hava um tann deyða. |

### 2. FILMUR: MONGU KENSLURNAR HJÁ MIU

| | |
|---|---|
| **Stutt um virknið** | Annar filmurin um Miu leggur dent á, at sorg er meira og annað enn at vera kedd/ur. |
| **Soleiðis gert tú** | 1. Hyggið at filminum.<br>2. Tit kunnu hyggja at filminum eina ferð afturat við steðgum, har tit tosa um einstøku støðurnar.<br>3. Floksprát um filmin. Hvat sóu næmingarnir? Hvat hoyrdu tey. Var okkurt, tey ikki skiltu? |

### 3. RØRSLA: STOPPDANSUR VIÐ KENSLUM

| | |
|---|---|
| **Stutt um virkið** | Næmingarnir hava hoyrt um, at kenslur kunnu skifta ofta, tá ið vit syrgja. Nú skulu tey royna tað at skifta kenslur. |
| **Soleiðis gert tú** | 1. Gerið pláss í flokkinum, soleiðis at øll fáa rørt seg, tá ið tey dansa.<br>2. Greið næmingunum frá, soleiðis sum er greitt frá í 3.-4. tíma á snar.fo. |

3. Sig eina kenslu og tendra tónleikin. Lat næmingarnar dansa kensluna í ein minutt.
4. Sløkk tónleikin og bið næmingarnar hyggja at hvørjum øðrum, ímeðan teir royna at standa so friðarligir, sum teir megna. Tað er ikki eins og í vanligum stoppdansi, tí næmingar fara ikki burturúr, um teir flyta seg.
5. Sig eina nýggja kenslu og tendra tónleikin.
6. Endurtak nakrar ferðir við ymiskum kenslum.
7. Flokssamrøða: Hvussu dugdu næmingarnir at kenna ymisku kenslurnar aftur? Sóu øll eins út?

**At draga fram**

- Vit vísa kenslur ymiskt.
- Tað er ikki altíð lætt at síggja, hvussu onnur hava tað.

## 4. TEKNING: TEKNIÐ, HVÍ MIA ER GLAÐ, ÓÐ OG KEDD

**Stutt um virknið**

Næmingarnir tekna og fáa tíð at hugsavna seg og hugsa um tað, sum tit hava gjørt hesar báðar tímarnar.

**Soleiðis gert tú**

1. Bið næmingarnar finna faldibøkurnar fram.
2. Flokssamrøða við dømum um, hvat ger okkum glað, óð og kedd. Tosið saman um, hvar ger, at Mia hevur hesar tríggjar kenslurnar.
3. Set næmingarnar at tekna í faldibókina, soleiðis sum er greitt frá á síðu 3 í bókini.

**Uppskot til spurningar til samanumtøku**

- Hvat hava tit valt at tekna? Hví hesa tekningina?
- Ger tað sama okkum glað, óð ella kedd?
- Hvussu síggja vit á Miu, um hon er glað, óð ella kedd?

## 5. RØRSLA: SAMD ELLA ÓSAMD?

**Stutt um virknið**

Í rørslu taka næmingarnir støðu til tað, sum teir hava arbeitt við.

**Soleiðis gert tú**

1. Sig við næmingarnar, at um eina løtu fara teir at hoyra nakrar setningar. Eru tey samd við setningin, skulu tey seta seg á borðið. Eru tey ósamd við setningin, seta tey seg undir borðið.
2. Les ein setning upp í senn og lat næmingarnar seta seg á/undir borðið. Spyr greinandi setningar so hvørt, og tá ið tú vilt vita, hví næmingarnir hava svarað, sum teir svaraðu.

**Uppskot til spurningar til samanumtøku**

- Eg haldi, at tað hevur verið stuttligt at gera kenslur saman við Miu, Adami og Noru í dag.
- Eg haldi, at tað er lætt at síggja, hvussu onnur hava tað.
- Eg haldi, at tað er lætt at vísa, hvussu eg havi tað.
- Eg haldi, at sumt av tí, sum vit skuldu gera í dag, var eitt sindur torført.
- Eg vil fegin gera fleiri venjingar saman við Miu, Adami og Noru.

# 5.-6. tími: Hvussu eru vit góðir vinir hjá einum floksfelaga, sum syrgir?

## FYRIREIKING OG TILFAR

- Kunna teg um 5.-6. tíma á snar.fo og á síðu 7-8 í hesari vegleiðingini.
- Hyggið at triðja filminum um Miu.
- Skriva avritssíðu 2 út: Góð ráð til Adam og Noru – Plakat til flokkin (1 ark NB: Skriva út í litum á A3)
- Skriva avritssíðu 4 út: Góð ráð til Adam og Noru – listi til faldibók (4 listar pr. síðu, ein listi pr. næming NB: skriva út í litum á A3).
- Tilfar: tekniamboð og faldibøkurnar hjá næmingunum frá seinastu tímunum.

## VEGLEIÐING OG HUGSKOT TIL HVØRT VIRKNI

### 1. SAMRØÐA: SEINAST OG Í DAG

**Stutt um virknið**

Tak afturíaftur frá seinastu ferð við teimum fýra myndunum á síðuni. Tríggjar tær fyrstu myndirnar vísa til tey trý lærumálini frá 3.-4.tíma, ímeðan seinasta myndin vísir til evnið um minnir frá fyrstu tímunum.

**Soleiðis gert tú**

1. Bið næmingarnar hyggja at teimum fýra myndunum og tosa saman um tær í pørum.
2. Tosið um, hvat tit gjørdu seinastu ferð, tit høvdu Lær um sorg. Hvat serligt minnast tey? Hvat var tað nú, sorg er? Hvussu vísa vit, at vit syrgja?

**Lærumál frá 3.-4. tíma**

- Vit kunnu føla okkum øðrvísi og einsamøll, tá ið vit syrgja.
- Vit kunnu gott spæla og vera glað, hóast ein, sum vit elska, er deyður.
- Vit vísa sorg á ymsan hátt, og tað er í fínasta lagi.

### 2. FILMUR: GÓÐU VINIRNIR HJÁ MIU

**Stutt um virknið**

Triði og seinasti filmurin um Miu leggur dent á, hvussu Nora og Adam kunnu vera góðir vinir hjá Miu – og at av og á hevur tað við sær, at tey mugu fara eftir lærarunum Hannu.

**Soleiðis gert tú**

1. Vís filmin um Miu.
2. Tit kunnu hyggja at filminum eina ferð afturat við steðgum, har tit tosa um tað, sum tit síggja.
3. Floksprát um filmin. Hvat sóu næmingarnir? Hvat hoyrdu tey. Var okkurt, tey ikki skiltu?

## 3. RØRSLA: EIN GÓÐUR VINUR HJÁ MIU

**Stutt um virknið**

Næmingarnir finna hugskot, hvussu Nora og Adam kunnu vera góðir vinir hjá Miu. Tey skulu brúka hugskotini til næsta virknið.

**Soleiðis gert tú**

1. Byrja við felags flokspráti í flokkinum um, hvussu vit eru góðir vinir. Duga næmingarnir at siga dømi um støður, har onkur hevur verið teimum góður vinur?
2. Set næmingarnar at gera soleiðis, sum er greitt frá í 5.-6.tíma á snar.fo – nú ræður um at fáa hugskot til, hvussu Nora og Adam kunnu vera góðir vinir hjá Miu.
3. Tak saman um hugskotini hjá næmingunum. Tú kanst skriva tey á talvuna, soleiðis at tey eru við hondina, tá ið tit fara undir næsta virknið.

**Uppskot til spurningar til samanumtøku**

- Hvørji hugskot høvdu tit? Hvørji hugskot fekst tú frá øðrum?
- Vóru onkur hugskot, sum tit ikki høvdu hoyrt um frammanundan? Hvørji?
- Er munur á, hvussu vit eru góðir vinir í flokkinum og tí, sum Nora og Adam kunnu gera fyri Miu? Hvussu?

## 4. SKRIVING: GÓÐ RÁÐ TIL NORU OG ADAM

**Stutt um virknið**

Samanumtøkan til gongdina er at gera ein lista saman í flokkinum við fimm ráðum, hvussu vit kunnu vera góðir vinir hjá einum floksfelaga, sum syrgir.

**Soleiðis gert tú**

1. Brúka hugskotini frá seinasta virkni, hvussu vit eru góðir vinir.
2. Vel 5 hugskot burturúr, orða tey sum ráð og skriva tey á ein lista, soleiðis at øll síggja tey (brúka evt. avritssíðu 3).
3. Bið næmingarnar finna faldibøkurnar fram.
4. Sig, at nú skulu tey klippa listan á avritssíðu 4 út og líma hann á innaru síðu á síðu 4 í faldibókini.
5. Set næmingar at skriva tey fimm felags ráðini í faldibøkurnar. Hava tit tíð, kunnu næmingarnir tekna smáar teknar við síðuna av.

## 5. RØRSLA: SAMD ELLA ÓSAMD?

**Stutt um virknið**

Enda tímarnar við rørsluvirksemi, har næmingarnir taka støðu til tað, sum teir hava lært í undirvísingini.

**Soleiðis gert tú**

1. Sig við næmingarnar, at um eina løtu fara teir at hoyra nakrar setningar. Eru tey samd við setningin, skulu tey seta seg á borðið. Eru tey ósamd við setningin, seta tey seg undir borðið.
2. Les ein setning upp í senn og lat næmingarnar seta seg á/undir borðið. Spyr greinandi spurningar so hvørt, og tá ið tú vilt vita, hví næmingarnir hava svarað, sum teir svaraðu.

**Uppskot til spurningar til samanumtøku**

- Eg haldi, at tað hevur verið stuttligt at gera venjingar saman við Miu, Adami og Noru í dag.
- Eg haldi, at okkurt av tí, sum vit skuldu gera í dag, var eitt sindur torført.
- Nú veit eg eitt sindur meira um, hvussu eg kann vera góður vinur hjá einum floksfelaga, sum syrgir.

# EYKA VIRKNI

Á lærarasíðuni á snar.fo eru fýra hugskot til eyka virkni umframt ein Miu-litbók at skriva út. Tit kunnu antin gera virkni sum framhald av tímunum, ella tá ið tit hava verið ígjøgnum allar gongdirnar. Tað er týdningarmikið, at tit hava tíð at fara ígjøgnum allar dupulttímarnar. Hava tit knappa tíð, mæla vit til, at tit fara ígjøgnum skránna, áðrenn tit gera eyka virkni.

## TEKNA: TEKNIÐ TYKKARA FAMILJUR

**Stutt um virknið**

Virknið leggur dent á, at familjur kunnu vera ymiskar. Í fyrsta filminum um Miu, síggja næmingarnir, hvussu familjan hjá Miu er, og næmingarnir sleppa at tekna sína familju á innaru síðuna á síðu 1 í faldibókini.

.

**Fyrireiking**

- Tilfar: Tekniamboð og faldibøkurnar hjá næmingunum.

**Soleiðis gert tú**

1. Greið næmingunum frá, hvat teir skulu gera, soleiðis sum er greitt frá á síðunum við eyka virkni á snar.fo
2. Tak samanum í flokkinum.

**At minnast til**

- Familjur eru ymiskar – og eingin familja er røtt ella skeiv.
- Vit eru framvegis í familju við tey deyðu – og tey eru hjá okkum á ein øðrvísi hátt.

## TEKNIÐ OG SKRIVIÐ: GERIÐ EINA HEILSAN TIL MIU

**Stutt um virknið**

Nú skulu næmingarnir hugsa um, hvat teir høvdu sagt við Miu, hevði tað borið til. Á baksíðuni á faldibókini kunnu næmingarnir tekna sína egnu heilsan til Miu. Við hesum fáa tey høvi at siga frá egnum upplivingum og royndum við gongdini.

.

**Fyrireiking**

- Tilfar: Tekniamboð og faldibøkurnar hjá næmingunum.

**Soleiðis gert tú**

1. Bið næmingarnar finna faldibøkurnar fram.
2. Flokssprát um, hvat næmingarnir høvdu hugsað sær at sagt við Miu.
3. Lat næmingarnar tekna og/ella skriva eina heilsan til Miu.

**Uppskot til spurningar**

- Hvat hava tit hug at siga við Miu?
- Hvat halda tit, Mia hevði verið glað at hoyrt?
- Hvat halda tit, er týdningarmikið, at Mia veit um tykkum?
- Hvussu ber til at siga tað við einari tekning?
- Hvørji orð eru góð at siga?

## RØRSLA: FARIÐ EIN TÚR Í KIRKJUGARÐIN

**Stutt um virknið**

Flokkurin fer ein túr í kirkjugarðin. Tit kunnu brúka túrin at tosa um, hvussu vit kunnu minnast tey deyðu í kirkjugarðinum og tekna, hvussu grøvin hjá mammu Miu sær út

**Fyrireiking**

- Farið ein túr í kirkjugarðin.
- Tilfar: Kanska A4-pappír og tekniamboð.

**Soleiðis gert tú**

1. Floksprát um, hvat ein kirkjugarður er, og ymsar gravir, og hvussu vit bera okkum at í einum kirkjugarði.
2. Flokkurin fer ein túr í kirkjugarðin. Lat næmingarnar kanna ymisku gravirnar við at hyggja at gravsteinum, ljósum, litum, blómum og øðrum, sum er á gravunum.
3. Floksprát um túrin.
4. Tit kunnu tosa um, hvussu grøvin hjá mammu Miu sær út, og lat næmingarnar tekna sína útgávu av grøvini.

**Uppskot til spurningar**

- Hvussu síggja ymsu gravirnar út?
- Hvat kann vera á einari grøv? Hví man ymist vera á grøvunum?
- Hvussu síggja við, hvør er grivin har?
- Hvussu síggja vit, at onkur saknar tey deyðu ella hevur góð minnir um tey?
- Hvat man Mia fara at seta á grøvina hjá mammuni? Og hví?

## KREATIVT: SPÆLIÐ VIÐ MIU, NORU OG ADAM

**Stutt um virknið**

Næmingarnir spæla dukkusjónleik við pappírsdukkunum og royna tey fimm góðu ráðini hjá flokkinum.

**Fyrireiking**

- Skriva avritssíðu 5 út: Spælið við Miu, Noru og Adam.
- Tilfar: Faldibøkurnar við teimum fimm ráðunum hjá flokkinum/tykkara felags uppsløg, saksar, klistur og blýantar.

**Soleiðis gert tú**

1. Greið næmingunum frá, hvat teir skulu gera, soleiðis sum er greitt frá á síðunum við eyka virkni á snar.fo.
2. Takið tykkara fimm góðu ráð fram.
3. Set næmingarnar saman í pør og lat teir spæla dukkusjónleik við pappírsdukkunum.
4. Tú kanst lata onkrar bólkar vísa flokkinum, hvat tey hava funnið uppá.
5. Takið samanum í flokkinum.

**Uppskot til spurningar**

- Hvørji av okkara fimm ráðum spældu tit? Hvør gjørdi og segði hvat? Vóru onkur ráð, sum vóru góð? Var torført at spæla onnur ráð?
- Fingu tit nýggj hugskot, hvussu Nora og Adam kunnu vera góðir vinir hjá Miu? Ella hvussu Hanna kann hjálpa teimum?